# Hava ilt við at hyggja í eyguni á hvørjum øðrum

*– Samgongan, sum tingmenn úr útjaðaranum skipaðu í heyst hevur longu fingið so nógv skot fyri bógvin, at henni var ikki lív lagað, sigur Jóannes Eidesgaard*



*– Samgongan ímillum tingmenn úr útjaðaranum hevur fingið so nógv skot fyri bógvin seinastu tveir mánaðirnar, at henni var ikki lív lagað. Íkki minst var tað støðan í heilsuverkinum, sum beindi fyri hesum samstarvinum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tann nógv umrødda útjaðarasamgongan er longu farin í søguna.

Tað var í heyst, at stig vórðu tikin til eitt samstarv ímillum tinglimirnar av bygd, tí hildið var, at tað kundi verið eitt gott tiltak at savna tingmenn uttanfyri Havnina í eini roynd at menna útjaðaran.

Men hendan útjaðarasamgongan, sum hon nevndist ímillum manna livdi ikki árið út, og nú er hon heilt sovnað burtur.

Og fyribils røkist onki fyri, at stig verða tikin til at reisa hana aftur.

–Hendan útjaðarasamgongan kundi verið eitt skilagott tiltak, tí har umrøddu vit nøkur viðurskifti, sum hava týdning fyri útjaðaran, sigur Jóannes Eidesgaard útjaðaraløgtingsmaður fyri javnaðarflokkin.

– Eitt nú var niðurstøðan, at tað hevur týdning, at útjaðarin nvarðveitir nakrar grundleggjandi tænastur.

– Og í tí sambandinum eru tað ikki minst sjúkrahúsini og samferðslan, sum hava stóran týdning.

– Men Jóannes Eidesgaard sigur, at tað var beinanvegin, at hendan samgongan fekk so mein skot fyri bógvin - og tað enntá frá sínum egnu - at hon kundi ikki yvirliva.

Og hann dugir ikki at síggja nakran møguleika fyri at endurreisa hana aftur.

Í hvussu so er kann hon ikki endurreisast í bræði og heldur ikki undir sama formi, sum hon var.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað var ikki minst, tá ið atkvøðast skuldi um fíggjarlógina, at split kom í útjaðarasamgonguna.

– Ikki minst var tað sjálvur stigtakarin til útjaðarasamgonguna, Jógvan við Keldu, sum gjørdi sítt til at søkka útjaðarasamgonguna.

Jóannes Eidesgaard vísir til, at tá ið løgtingið skuldi atkvøða fyri meiri peningi til Suðuroyar Sjúkrahús, varð tað felt, kendi Jógvan við Keldu seg so bundnan at samgonguskjalinum, at hann vildi ikki atkvøða fyri.

– Hevði hann so hildið fast við tað, so kundu vit góðtikið tað sum ein part av bindingunum, sum liggja í at vera í samgongu.

–Men tað gjørdi hann ikki, tí tá ið eitt uppskot kom frá andstøðuni um at játta pening til autistaheimið í Klaksvík, var hann beinanvegin klárur og atkvøddi fyri.

–Tá ið hann sá, at hann kundi fara saman við andstøðuni um at fáa nakað til Klaksvíkar, stóð ikki á.

– Men tá ið tað galt um at vinna øðrum økjum í landinum ein bata, bar ikki til.

Jóannes Eidesgaard sigur, at avgerðandi banahøggið fekk útjaðarasamgongan, nú tingið skuldi atkvøða um at leggja oljuhavn í Suðuroy.

— Tá var Jógvan við Keldu burturstaddur, umframt at teir báðir vágatingmenninir atkvøddu ímóti.

**Bar til viðhvørt**

Jóannes Eidesgaard sigur, at annars bar tað til hjá útjaðaratingmonnunum at standa saman í vissum førum.

– Eitt nú vóru ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni nógv viðgjørdir í útjaðarasamgonguni og tá eydnaðist tað okkum at standa saman, so at landsstýrið ikki slapp at hækka prísirnar.

– Men tá ið tað so kom til onnur øki, sum vóru minst líka átrokandi, kom split í.

Og Jóannes Eidesgaard sigur, at lagnan hjá øllum hesum málinum hevur gjørt, at tingmenninir úr útjaðaranum hava eitt sindur ilt við at hyggja í eyguni á hvørjum øðrum, tá ið tosað verður um at menna útjaðaran.

Hann heldur tí, at tað er frægast, at útjaðarasamgongan verður slept í fyrstu syftu.

– Tað eru enntá teir útjaðaratingmenn, sum eru so vónbrotnir, at teir halda slett ikki, halda fram yvirhøvur.

– Men eg haldi í øllum førum, at tað er neyðugt at lata eina tíð ganga. So kann hon møguliga takast uppaftur undir onkrum øðrum formi, sum er meiri skipaður, enn hesuferð.

Og Jóannes heldur avgjørt, at tað kundi verið nyttugt, at tingmenn úr útjaðaranum, sum allir hava somu trupulleikar at dragast við, tosaðu meiri saman um, hvussu tey ymsu økini í landinum kunnu styrkjast.

– Eitt nú kundu útjaðarapolitikarar verið við til at lagt eina heildarætlan fyri, hvørjar tænastur møguliga kunnu flytast úr Havnini, heldur Jóannes Eidesgaard.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking fra Jógvani við keldu, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Vegur í Vági skal flytast

*– Tað fer at forkoma øllum møguleikum at gera grasvøll í Vági einaferð í framtíðini, sigur Páll Augustinussen*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skal vegurin tvørtur um Sandin í Vági flytast.

Hann hevur altíð ligið dygst framvið sjálvum Sandinum, men á fundi mikukvøldið samtykti Vágs Býráð at flyta vegin longur vestur.

Nú farið er undir arbeiðið at fríðka Trýkantin, har m.a. nýggjársbálið verður brent, hevur býráðið eisini biðið Landsverkfrøðingin gera eina meting av, hvar vegurin tvørturum Sandin liggur frægast.

Vegurin tvørturum Sandin er bindiliðið ímillum bygdirnar sunnanfyri og Vág- og bygdirnar norðanfyri og er sostatt ein høvuðsvegastrekki í Vági.

Landsverkfrøðingurin heldur, at tað er óheppið at vegurin liggur dygst framvið mølini.

Landsverkfrøðingurin hevur heldur tí, at tað er frægast at leggja vegin longur vestur og at binda í sjálvan høvuðsvegin í Vági nakað vestan fyri Báruna.

Landsverkfrøðingurin heldur, at hetta evur eina betri vegaføring.

Men samstundis verður vegurin leysur av mølini og økið, har Trýkanturin er, og har vegurin nú liggur, kann gerast til eitt fríøkið.

**Forkemur grasvølli**

Avgerðir í Vágs Býráð eru oftast einmæltar. mn í hesum málinum kom split í.

Tí tann eini býráðslimurin, Páll Augustinussen, var avgjørdur ímóti hesi ætlanini.

Hann segði, at verður vegurin lagdur, soleiðis, sum landsverkfrøðingurin vil, kemur hann at liggja ígjøgnum eina av teimum heilt fáu, grønu blettunum, sum eru eftir í Vági.

Men hann hugsaði eisini um framtíðina.

Hann segði, at einaferð verður tað eitt krav, at fótbóltur verður spældur á grasvølli og tískil fer eisini krav sett vágbingum um at útvega ein grasvøll.

Men stykkið, sum vegurin nú skal ígjøgnum er avgjørt einasta plássið í Vági, har tað ber til at gera ein grasvøll.

So verður vegurin lagdur, fer tað at forkoma øllum møguleikum at gera grasvøll í í Vági, tá ið tann tíðin kemur

Hann skeyt ístaðin upp at fylla Sandin upp uttanfyri vegin, har hann nú liggur, tí so bar tað væl til at gera ein tíðarhóskandi veg har.

Hann vísti eisini á, at Sandurin var altíð so skitin av øllum tí, sum rak á land, at tað gjørdi onki, um tað varð fylt upp.

Men royndirnar hjá Páll Augustinussen hjálptu einki tí ein meiriluti av býráðnum samtykti ætlanin.

# Sølustevna á Tvøroyri

*Aftur í ár verður skipað fyri sølustevnu í ítróttarhøllini á Tvøroyri á páskum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Ítróttarhøllin á Tvøroyri verður aftur á páskum í ár karmurin um eina stóra sølustevnu.

Seinast, sølustevna var á Tvøroyri á páskum, var fyri tveimum árum síðani, og tann stevnan var so mikið væl egnað, at fyrireikararnir hava dirvi til at royna tað einaferð enn.

Tó vóru onkur mistøk seinast, men hesumferð hava teir so tann fyrimun, at teir hava lært av teimum mistøkum, teir gjørdu seinast og fáa tískil rætta tey.

Stevnan í ár verður í døgunum 13. 16. apríl og eins og í fjør, ætla fyrireikararnir at gera tað, teir kunnu, fyri at bæði framsýnarar og gestir koma at føla seg væl.

Fyri at fáa stevnuna so áhugaverda sum gjørligt, er ætlanin at framsýningin skal vera so fjølbroytt sum gjørligt, sigur ein av fyrireikarunum, Jóan Petur Olgarsson.

Hann sigur, at seinast var tað ein fragd, hvussu nógv framsýnararnir gjørdu burturúr at pynta básarnar. Og aftur í ár verður kapping ímillum framsýnararnar um tann vakrasta básin.

Á stevnuni verður eisini skipað fyri undirhaldi fyri gestirnar, umframt at skipað verður fyri tiltøkum fyri tey, sum sýna fram.

Men enn er tað ikki lagt í fastar karmar, hvørji tiltøk, talan verður um.

Eins og seinast, kunnu framsýnarar leiga básar fyri fast gjald fyri fermeturin.

Men bilasølur, sum hava brúk fyri serliga stórum básum, fáa avsláttur. Básarnir eru í trimum støddum, 8-12 og 14 fermetrar, men teir fáast eisini eftir avtalu.

Upprunaliga vórðu 35 básar til taks og farið verður fram eftir aðalregluni um, at tann sum verður fyrstur, sleppur eisini fyrstur at velja sær bás.

Leivur Nygaard, sum er við til at legja til rættis, sigur at stórur áhugi er fyri at sleppa við á framsýningina og meiri enn helvtin av básunum eru longu seldir.



# Fundarboð við Áir

*Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík, boðar nú høgum og lágum til fundar um ALV skúlan. Orsøkin er kjakið um, hvørt ALV skúlin og Brandskúlin kunnu liggja lið um lið og hvør teirra hevur loyvi at vera á staðnum*

DAGFINN OLSEN

Fyri tíð síðani var nakað av kjaki (serliga í Sosialinum, sum tók málið upp, blðm) um ALV skúlan, sum liggur norðuri við Áir, har Brandskúlin eisini liggur.

Tað kom fram, at ALV skúlin fleiri ferðir hevur kært sína neyð fyri myndugleikunum, tí illa er livandi fyri royki og hita, tá venjingar eru hjá grannanum, Brandskúlanum.

Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík, legði uppí kjakið og vísiti á aðra forvitnisliga síðu í málinum.

Hann vísiti á, at frá kommununi hevði ALV skúlin ikki neyðugu loyvini.

Tað vísiti seg, at hetta var mál við nógvum ymsum síðum og kenslum.

Nakað av kjaki stóðst av manna millum í bløðunum. Men málið steðgaði upp, doyði burtur.

Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík hevur fylgt málinum við stórum áhuga.

Hann vil fegin hava greiðu á málinum og tí hevur hann boðað myndugleikum, landsstýrismonnum, nevndum og øðrum til fundar norðuri á ALV skúlanum tann 6. mars.

Jógvan Mørkøre vil hava at vita, hvat gongur fyri seg og um ætlanin er, at báðir skúlarnir skulu vera á økinum við Áir.

Ein av ætlanum hansara er at vísa á, at tá almennir myndugleikar koma inn á kommunualt øki, so eiga teir at lutrta eftir og ráðføra seg har. Tað metir hann verður ikki altíð gjørt og er ikki gjørt viðvíkjandi skúlunum við Áir, tí lítið og einki er í pappírsgoymslunum hjá Hósvíkar kommunu um ALV skúlan.

Jógavn Mørkøre sigur, at longu nú er greitt, at landsstýriskvinnan Helena Dam á Neystabø kemur ikki á fundin, tí tað liggur ikki fyri og heldur ikki kemur Yvirfriðingarnevndin, tí hon metir seg ikki eiga lut í málinum.

Men høg og lág hava fingið fundarboð til fundin norðuri við Áir tann 6. mars.



*Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík*



# Bygginevndin á ferð til Svøríkis

*Bygginevndin á Landssjúkrahúsinum er farin til Svøríkis og til Oslo at hyggja, hvussu tey har bera seg at. Peningurin til ferðina hevur einki við dagliga raksturin av Landssjúkrahúsinum at gera, frættist úr Almanna- og Heilsumálastýrinum*

DAGFINN OLSEN

Mary í Garði í Almanna- og Heilsumálastýrinum sigur, at að er vanligt at fara slíkar ferðir. Nýbyggingin á Landssjúkrahúsinum er komin so mikið langt, at nú skal projekterast.

- Hetta er ætlan, sum kostar nógvan pening, so ein má tryggja sær, at alt er sum tað skal. Alt annað hevði verið løgið, heldur Mary í Garði.

Bygginevndin hyggur seg um í Svøríki og í Oslo. Í slíkari nevnd eru t.d. umboð fyri Landssjúkrahúsið, umboð fyri serkunnleika, t.v.s. læknar og sjúkrasystrar og arkitektar.

Mary í Garði sigur, at kostnaðurin av slíkari ferð hevur einki við vanliga raksturin av Landssjúkrahúsinum at gera.

- Í 1999 vóru 14 milliónir settar av til útbyggingina.Í 2000 eru 10 milliónir settar av, sigur Mary í Garði, sum ger vart við, at vit í Føroyum eiga ikki royndir við nýbygging á hesum økinum, tí tá seinast var talan um slíkt, so var tað á sjúkrahúsinum í Suðuroynni og har var talan upp at byggja uppí.

Nýbyggingin á Landssjúkrahúsinum er nú komin til 2. byggistig, tað vil siga fundament og kloakkering.

Endalig projektering skal gerast í ár.




-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| TOYOTA CAMRY<br>2,2 XL<br>Skrás.: 21-12-91<br>Km.: 80.000<br>Prísur: 98.600,- Garanti* | TOYOTA COROLLA<br>1,3 Xli<br>Skrás.: 24-06-97<br>Km.: 43.000<br>Prísur: 112.600,- Garanti** |
| TOYOTA CARINA<br>2,0 Gli SEDAN<br>Skrás.: 13-11-96<br>Km.: 27.000<br>Prísur: 142.600,- Garanti* | TOYOTA COROLLA<br>1,3 H/B<br>Skrás.: 05-08-92<br>Km.: 107.000<br>Prísur: 45.600,- |
| TOYOTA CARINA<br>1,6 GL L/B<br>Skrás.: 21-08-90<br>Km.: 124.000<br>Prísur: 60.600,- | TOYOTA HIACE 10 PERS.<br>BUSSUR<br>Skrás.: 16-06-95<br>Km.: 160.000<br>Prísur:138.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA<br>1,6 GL<br>Skrás.: 01-11-89 Sýnaður 14-10-98<br>Km.: 154.000<br>Prísur: 49.600,- | FORD MONDEO<br>1,8<br>Skrás.: 07-05-97<br>Km.: 12.000<br>Prísur: 149.600,- Garanti* |
| TOYOTA COROLLA<br>1,3 L/B TERRA<br>Skrás.: 27-02-98<br>Km.: 30.000<br>Prísur: 120.600,- Garanti** | FORD FIESTA<br>1,3<br>Skrás.: 29-04-96<br>Km.: 104.000<br>Prísur: 66.600,- |
| TOYOTA CAROLLA<br>1,3 SEDAN<br>Skrás.: 12-02-96<br>Km.: 16.000<br>Prísur: 97.600,- Garanti* | NISSAN SUNNY<br>1,4 LX SEDAN<br>Skrás.: 01-11-91<br>Km.: 146.000 Sýnaður 01-04-99<br>Prísur: 49.600,- |
| TOYOTA COROLLA<br>1,6 Xli H/B<br>Skrás.: 31-10-96<br>Km.: 35.000<br>Prísur: 110.600,- Garanti* | NISSAN MAXIMA<br>3,0 AUT. GEAR Sýnaður 01-12-99<br>Skrás.: 15-12-87<br>Km.: 135.000<br>Prísur: 69.600,- |
| AVHEINTINGARTILBOÐ<br>HONDA CIVIC 1,5<br>Skrás.: 01-06-86<br>Km.: 175.000<br>Prísur: 15.000,-<br>OPEL KADETT<br>Skrás.: 01-06-86<br>Km.: 97.000 Sýnaður 01-06-99<br>Prísur: 10.000,- | FORD SIERRA<br>1,6 AUT. GEAR<br>Skrás.: 01-07-87<br>Km.: 117.000 Sýnaður 01-10-98<br>Prísur: 7.000,-<br>MITSUBISHI GALANT<br>T DIESEL<br>Skrás.: 25-08-89<br>Km.: 287.000<br>Prísur: 19.000,- |
| SERTILBOÐ<br>KIA CLARUS<br>1,8 SEDAN<br>-í besta standi !!<br>Skrás.: 16.04.98<br>Km.: 13.000<br>Prísur: 98.600,-<br>Garanti* | VØRUVOGNUR<br>MITSUBISHI<br>PAJERO VAN<br>Skrás.: 05-10-95<br>Km.: 80.000<br>Prísur: 154.600,-<br>Støkkið inn á gólvið! |

Sosialurin - 311820

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040